## Útvístur fyri hurðasølu

Maðurin sum í leygardagin varð handtikin, fyri at selja blýantsteknningar, var fyrrapartin sunnudagin í rættinum. Har varð hann útvístur úr Føroyum. Harumframt fekk hann 1000 krónir í bót. Eisini varð hald lagt á tær 24 myndirnar maðurin hevði og 200 kr., sum hann hevði fingið fyri søluna.

Maðurin var komin úr Íslandi við Norrønu saman við øðrum pólendingum. Hann sigur, at tey gjørdust ov sein til skipið, og tí máttu bíða eftir næsta farti.

Umframt at hava brotið lógina um hurðasølu, virkaði maðurin eisini í Føroyum uttan arbeiðsloyvi.

Løgreglan leggur ikki skjól á, at kvika og avgjørda handfaringin av málinum, hevur eitt fyribyrgjandi endamál.

Neyðugt er at steðga ólógligum virksemið millum ferðafólk beinanvegin. Ein annar av pólendingunum varð steðgaður av løgregluni fríggjadagin. Men tá vóru eingi prógv um sølu, og hann slapp tí við eini ávaring. Eisini hevur løgreglan fingið fráboðan um eina kvinnu, sum somuleiðis seldi myndir. Men hon er ikki handtikin enn.

Tann dømdi verður sendur avstað við flogfarinum hjá Atlantsflog í morgin árini. Úr Keypmannahavn verður hann sendur víðari til Pólland.

**-NuD**

## Tikin fyri at koyra fullur

Klokkan tíggju minuttir í seks leygarnáttina varð ein maður tikin fyri at koyra fullur í Havn.

Løgreglan tók mannin á støðina, og blóðroynd varð tikin.

Seinni fæst at vita, hvat promillan var, og hvørt maðurin stendur til at missa koyrikortið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

**-hkm**

## Sum heild friðarligt kring landið

Løgreglan kring landið letur væl at, nógv tiltøk hava verið, men uttan fyri Havnina hevur lítið verið av ófriði. Ein maður varð tikin á løgreglustøðina í Klaksvík at sova, aftan á húsófrið, men slapp leysur uttan ákæru sunnumorgunin.

Í Eysturoynni, hendi eitt ferðsluóhapp á Keiðini í Runavík, tá ein bilur rendi á eini hús. Men annars var ikki stórvegis at boða frá.

Í Vágunum var kontridansur, men sambær±t løgreglustøðini í Miðvági var stak friðarligt hóast nógv fólk vóru í dans.

**-NuD**

## Rokalig sunnunátt í Havn

Løgreglan í Havn varð sunnunáttina, tvær ferðir, kallað út til húsaófrið. Báðar ferðirnar var tó rættuliga friðarligt, tá løgreglan kom á staðið, og tosaði fólk til rættis. Tað eina staðið var ein spegil brotin men eingin bleiv tó handtikin.

Við Badmintonhøllina varð løgreglan boðsend um hálvgum trý tíðina, tí tveir menn vóru farnir til hendur. Eingin hevði fingið mein, og teir sissaðust, tá løgreglan kom, tí varð heldur eingin av teimum tikin við.

Løtu seinni varð løgreglan aftur boðsend til Badmintonhøllina. Ein genta varð vorðin illa fyri av rúsdrekka. Løgreglan boðsendi sjúkrabil, og gentan varð tikin við á Landssjúkrahúsið.

Tvær ferðir sunnunáttina var løgreglan boðsend á vertshús í býnum, aftan á ófrið. Báðu ferð eydnaðist tað at fáa fólk, at sissa seg, og fara hvør til sítt, so neyðugt varð ikki at taka nakran við á støðina.

**-NuD**



*Familjudagur í gongugøtuni.*

*Mynd: Hans Kárason Mikkelsen*

# Ljósið hevði familjudag

Fimleikafelagið Ljósið skipaði leygardagin fyri loppumarknaði og øðrum í gongugøtuni í Havn.

Jonna Djurhuus, peningarøkil í fimleikafelagnum Ljósið, sigur, at endamálið er at savna inn pening til felagið.

- Hetta er árligi familjudagurin hjá felagnum. Umframt loppumarknað kunnu børnini stuttleika sær við smábátasigling í lítlum hyli, og so hava vit eisini Káta Køkin og annað, sigur Jonna Djurhuus.

Tað eru meir enn 700 limir í fimleikafelagnum, og Jonna Djurhuus sigur, at limatalið økist á hvørjum ári. Hon sigur seg vóna, at felagið skjótt fær eina fimleikahøll, sum ætlanin leingi hevur verið.

**-hkm**

# Varandi orka er vegurin fram

Elfelagið SEV sigur í tíðindaskrivi, aftan á hálvárliga umboðsnevndarfundin at felagið ætlar at útbyggja vatn- og vindorkuna. Eisini eru luttekur felagið í menningarverkætlanum innan aldu- og sólorku.

Avlopið í 2004 varð 27 milliónir krónur, og skal nýtast til neyðugar íløgur í el-netið og til varandi orku, sum skal minka $CO_2$-útlátið. Her er talan fyrst og fremst um vind- og vatnorkuna í Eysturoynni.

Samanumtikið hepnaðist fíggjarárið 2004 væl. Framleiðslan burtur úr vindi og vatni øktist, og samstundis minkaði framleiðslan á motorverkunum. Tað bar við sær, at SEV keypti minni av olju í 2004 sammett við 2003.

Í samstarvi við Vestmanna Kommunu hevur felagið høvi at fylgja við sólorkuskipanini hjá vestmenningum.

Á vetnisøkinum, hevur SEV skipað samtakið, North Atlantic Hydrogen Association, saman við íslendska felagnum, Icelandic New Energy, og orkumyndugleikunum í Føroyum og Grønlandi. Hetta fyri at menna kunnleikan um vetni. Hesin orkuformur kann gerast ein týðandi partur í framtíðar orkuhøpi

SEV og Tórshavnar Kommuna eiga helvt um helvt av Fjarhitafelagnum, sum veitir húsum í Hoyvík hita frá Brennistøðini á Hjalla. Nú útbyggingin í Hoyvíkshaganum heldur fram, verður neyðugt at fáa meira hita til vega frá Sundsverkinum, og tí skal fjarhitaleiðingin millum Sundverkið og Brennistøðina á Hjalla útbyggjast. SEV hevur avgjørt at seta 2,5 milliónir krónur afturat í Fjarhitafelagið treytað av, at Tórshavnar Kommuna ger tað sama.

Avlopsorkan til fjarhita, sum er tøk á Sundsverkinum, kann hita umleið 2000 sethús alt árið. Við miðstøðuhita við gassolju, høvdu hesi hús brúkt seks milliónir litrar av olju um árið. Fjarhitin Tálmar harvið $CO_2$-útlátið.

Sambært tíðindaskrivinum er størri opinleiki í SEV, aftan á broytingarnar í viðtøkunum í fjør. Henda opinleika fer Elfelagið í alsamt størri mun at vísa í verki. Í næstu viku fer SEV at senda øllum húsarhaldum og øðrum viðskiftafólkum hjá Elfelagnum ritið, SEV Í ORÐUM OG TØLUM. Í ritinum eru - umfram ársfrágreiðingina og ársroknskapin 2004 - greinar, myndir og talvur, sum lýsa partar av dagliga virkseminum hjá SEV.

**-NuD**